## Málmaður bað um umbering

Michael Rensing fanst í farnu viku at týsku fjølmiðlunum, tí teir hava funnist at honum, síðani hann tók við sum málmaður í Bayern eftir Oliver Kahn. Eftir tapið ímóti Køln um vikuskiftið, var tónin hjá Rensing tó ein annar. - Fyrst og fremst mugu vit biðja um umbering frá okkara viðhaldsfólkum eftir hendan dystin. Vit høvdu ikki uppiborið nakað stig fyri okkara avrik hesaferð, segði Michael Rensing.



## Hamburg á odda

Hambergur SV legði seg um vikuskiftið á odda í týsku landskappingini. Hoffenheim, sum hevur havt oddasessin, spældi javnleik, og Bayern, sum eisini hevur ligið framvið, tapi. Hamburger SV spældi ímóti Leverkusen, og tað eydnaðist teimum úr Norðurtýsklandi at vinna dystin 2-1. Hamburg er tvey stig frammanfyri Hoffenheim í Budesliguni.

# Fótbóltssambandið lívligan aðalfund

**– Nógv sjónarmið og lívligt orðaskifti bera boð um ein livandi aðalfund. Tá talan er um konstruktivan kritikk, kunnu vit brúka hann í arbeiðinum at seta kósina fyri framtíðina, sigur FSF-forsetin, Høgni í Stórustovu.**



*Serliga, tá leikarareglugerðin var á skránni, hevði Hans F. Hansen frá B71 fleiri viðmerkingar*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**FSF-AÐALFUNDUR**
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Leygardagin var Parnassið á Hotel Hafnia karmur um 30. aðalfundin hjá Fótbóltssambandi Føroya, ið var skipaður eitt sindur øðrvísi, enn vanligt hevur verið. Eitt var, at hann ikki var í FSF-húsinum, men eisini skráin var øðrvísi, tí ymsar framløgur og orðaskifti vóru á skránni fyrrapartin, áðrenn sjálvur aðalfundurin var seinnapartin.

Tað var eisini serliga fyrrapartin, at orðaskiftið var lívligt, og mest gongd var í, tá leikarareglugerðin var á skránni. FSF-forsetin, Høgni í Stórustovu, greiddi frá reglugerðini, ið skal fáa skipað viðurskifti á økinum, tá spælarar flyta frá einum felag til annað. Og ikki minst var tað figgjarligi parturin av hesum flytingum, ið elvdi til orðaskifti.

Málið, tá Magnus Olsen flutti frá B71 til B36 í fjør, hevur fremst av øllum skundað undir, at ein nýggj leikarareglugerð er gjørd, og tað var eisini fyri tað nógva Hans F. Hansen frá B71, sum hevði viðmerkingar til reglugerðina, tá orðið var frítt eftir framløguna frá FSF-forsetanum.

– Hóast vit hava havt eina rúgvu av góðkendum sáttmálum við spælarar, so mugu vit bara viðurkenna, at hesir sáttmálar ikki hava verið verdir tað pappír, teir eru skrivaðir á, segði Hans F. Hansen, sum millum annað vísti á, at uppaling av einum spælara frá 12 ára aldri og til hann er búgvin ið lættliga kundi taka til til besta liðið í felagnum, eigur at vera meira verd enn tær 20.000 krónurnar, nýggja reglugerðin leggur upp til.

### Upphæddin skal upp

At upphæddin kanska er sett nakað lágt, er eisini nakað, Høgni í Stórustovu heldur, at Fótbóltssambandið lættliga kundi taka til eftirtektar, og hann sigur seg vera opnan fyri at tríva í ymiskt av tí í leikarareglugerðini, sum kann rættast og betrast, áðrenn hon er endalig.

– Vit hava fingið eina greiða ábending um, at upphæddirnar skulu vera hægri. Hinvegin vænti eg ikki, at vit fara at broyta meginregluna um, at leikarareglugerðin bara fevnir um spælarar, til teir eru 23 ára gamlir, sigur FSF-forsetin, sum vísir á, at hóast nógvir pengar kunnu vera uppií, tá spælarar fara til eitt felag uttanlands, so er nógv meira sannlíkt, at spælarar flyta frá smærri til størri feløg í Føroyum.

– Tað, sum hevur størsta týdningin, er tó, at vit nú hava eitt grundarlag til at viðgera hesi viðurskifti, so vit kunnu fáa fastar mannagongdir og nøkur standardskjøl. Fáa vit tað, so kunnu vit sleppa undan fleiri kærum og trupulleikum, tá spælarar skifta millum feløg. Tað skal vera greitt, hvør handlar og hvør tekur endaligar avgerðir.



### Gott við kritikki

At orðaskiftið gjørdist lívligt og fleiri sjónarmið og spurningar komu fram, hóvar FSF-forsetanum sera væl, tí hann heldur tað vera umráðandi hjá Fótbóltssambandinum at hoyra, hvat limafeløgini hava upp á hjarta.

– Nógv sjónarmið og lívligt orðaskifti bera boð um ein livandi aðalfund. Tá talan er um konstruktivan kritikk, kunnu vit brúka hann í arbeiðinum at seta kósina fyri framtíðina, sigur Høgni í Stórustovu, sum serliga fegnaðist um, at feløgini tóku undir við tí partinum av formansfrágreiðingini, sum snúði seg um, hvønn veg gongdin í føroyskum fótbólti skal vera í 2009.

– Tað er eisini gott hjá okkum at vita, at vit eru á einari gongdari leið, staðfesti hann.

